Sosialurin

Nr. 170 - 08. september 2009



## Ísland ikki á skránni

Íslendska lánið úr grunninum stendur ikki á dagsskránni fyri fundin í Altjóða Gjaldoyragrunninum, sum verður næsta mánadag. Sambært fíggjarmálaráðnum í Reykjavík var tað eitt mistak, sum gjørdi, at íslendska lánið ikki kom á dagskránna, men ætlanin er at seta málið á skránna fyri ein fund, sum verður síðst í mánaðinum. Leiðslan í IMF samtykti í fjør at læna Íslandi 2,1 milliardir dollarar undir ávísum treytum, og Norðurlond samdust um at læna íslendsku stjórnini 2,5 milliardir dollarar tilsamans. Tað fyrsta lánið, sum íslendin gar fingu, var úr Føroyum.

Vælferðarføroyar í fillum:

# 20 milliónir færri merkja

**Tað er skeivt at siga, at vælferðarføroyar eru í fillum, men tað merkist, at 20 milliónir skuldu sparast, og tí eru rationaliseringar gjørdar. Hetta heldur Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna, sum eisini heldur at nógv gott er komið burturúr**



ALMANNAMÁL

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna við almannamálum, heldur, at tað ber ikki til at siga, at vælferðarføroyar eru í fillum, Tí í Føroyum brúka vit yvir tvær milliardir krónur upp á vælferðartænastur í almanna- og heilsuverkinum. Hinvegin greiðir hon frá, at tað má merkjast, at meira enn 20 milliónir skulu sparast.

- Tað hevur kravt, at nakrar rationaliseringar skuldu gerast, og tað er tað, vit arbeiða við, sigur Rósa Samuelsen.

Hon greiðir víðari frá, at rationaliseringarnar, sum eru gjørdar, í nógvum førum hava verið neyðugar í longri tíð, og serliga hevur nógv av nýggja regluverkinum innan heilivág verið krav frá landsgrannskoðanini.

Eisini greiðir hon frá, at fer mann at hyggja at støðinum í Føroyum hjá teimum veiku, so er tað framvegis eitt miðalstøði í mun til grannalondini.

### Heilivágur

Sosialurin vísti fríggjadagin á, at tað er komið sera óvart á fólk, at tey eru komin á apotekið, fyri síðani at fáa at vita, at heilivágurin hjá teimum er vorðin nógvar ferðir dýrari, tí tað almenna ikki longur veitir stuðul til henda heilivág.

- Vit hava gjørt nakrar umleggingar, soleiðis at vit hava greiðar reglur um, hvønn heilivág almannastovan letur stuðul til. Hetta hevur verið eitt krav frá landsgrannskoðanini, tí ov ógreiðar reglur hava verið. Somuleiðis ber til at siga, at nýggju reglurnar fylgja viti og skili, tí nú veitir almannastovan bert stuðul til heilivág, sum sjúkrakassin kann standa inn fyri, sigur Rósa Samuelsen.

Hon leggur afturat, at hjá nógvum er heilivágurin vorðin bíligari, tí tey eru farin at nýta bíligari heilivág.

Spurd, um kunningin hevur verið nóg góð, tá fólk tað í nógvum førum kemur sera óvart á fólk, tá tey koma á apotekið, og fáa at vita, at heilivágurin er vorðin sera dýrur, sigur landsstýriskvinnan, at hon illa dugir at ímynda sær, hvat tey kundu gjørt betri.

- Vit hava kunnað kommunulæknar og apoteksverk, samstundis sum fjølmiðlarnir hava viðgjørt broytingarnar, men kanska hevur skipanin ikki verið heilt klár til broytingarnar, greiðir hon frá.

Hon vísir somuleiðis á, at kann sjúkrakassin ikki veita stuðul til onkran heilivág, so kunnu fólk fara aftur til læknan, sum síðan kann vísa á, hvør heilivágur er neyðugur hjá hvørjum einstakum brúkara.

Eisini sigur hon, at allar broytingarnar eru gjørdar í semju við landsapotekaran og at ráðið hevur nógv samband við apoteksverkið um broytingarnar.

### Fótarøkt er tryggjað

Rósa Samuelsen heldur tað vera sera óheppið, at eitt uppskot um at flyta fótarøkt frá almannamálaráðnum til heilsumálaráðið, skal blíva til, at fótarøktin verður avtikin, tí tað hevur ongantíð verið ætlanin.

- Sjálvandi skal fótarøktin ikki takast av. Vit arbeiða hinvegin við eini ætlan at flyta fótarøkt frá almannamálaráðnum til heilsumálaráðið, so at viðgerð verður flutt til heilsumálaráðið undir nýggju sjúkratryggingarlógina, sigur Rósa Samuelsen.

Hon leggur afturat, at tað sama ger seg galdandi fyri viagratablettirnar hjá diabetikarum.

- Allir kronikarar verða ætlandi fluttir undir heilsumálaráðið, og tí verða hetta mál fyri eitt annað landsstýrisfólk, sigur hon.

### Fólk við breki

Viðvíkjandi trupulleikunum hjá fólkum við breki, har stuðlar eftir øllum at døma ikki verða settir í starv í løtuni, samstundis sum tey hava sera trupult við at skipa fyri útferðum og so framvegis við stuðlum, greiðir Rósa Samuelsen frá, at hon ikki veruliga kennir til hetta.

- Tað er nokk ein spurningur um pengar, tí Nærverkið hevur eina avmarkaða játtan, so helst er tað orsøkin til, at fólk við breki í ávísum førum ikki hava